## *Avloysarastørv sum málsviðgerar*

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi koma at starvast, er á Smyrilsvegi, Posttolldeildin heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

*Heimasíða*
*www.tollskatt.fo*

*E-mail*
*streymoy@tollskatt.fo*

Søkt verður eftir 2 avloysarum vegna barnsburðarfarloyvi fyribils í 1 ár til eftirlits- og innheintingardeildina í Streymoyar øki at byrja skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur**
**Virkiseftirlitið:** Arbeiðið fevnir um at umsita vinnuskrásetingina og hartil hoyrandi uppgávur.

**Innheintingin:** Arbeiðið fevnir um dagliga málsviðgerð av almennari skuld, herundir gera gjaldsavtalur, útrokningar av gjaldførisførleika og svara munnligum og skrivligum spurningum frá viðskiftafólki. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við ein pantifúta.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava HH-útbúgving. Viðkomandi skulu vera arbeiðssom og fyrikomandi, og skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um størvini fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Hallbjørg Hansen, deildarleiðara, á tlf. 31 02 60.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

*23. februar 2004*

**Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki**
**Postsmoga 3139**
**110 Tórshavn**

---

VINNUHÚSIÐ
*House of Industry*



Húsini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag R. C. Effersøesgøta 30 í Tórshavn verða lýst til sølu.

Húsini eru bygd í 1968 og eru uml. 290 m² í trimum hæddum kjallara, miðhædd og loft. Í húsinum eru 7 skrivstovur og 2 fundarhøli. Teldunet er innlagt í húsið. Húsini liggja mitt í býnum. Parkeringsøki, sum rúmar 8-10 bilum er aftanfyri húsini. Húsini er vælegnaði til skrivstovuhølir, men niðasta hæddin kann eisini brúkast sum handilshølir.

Áhugað, sum ynskja at síggja húsini, kunnu venda sær til umsitingina í Vinnuhúsinum.

Møgulig boð upp á húsini skulu latast skrivliga til Vinnuhúsið, umvegis fax ella teldupost á industry@industry.fo

Myndir av húsinum innan og uttan eru at síggja á heimasíðu okkara www.industry.fo

Vinnuhúsið · Boks 1038 · R. C. Effersøesgøta 30 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 18 64 · Fax +298 31 72 78 · E-mail: industry@industry.fo

---

www.sosialurin.fo

---

**Røktar- og umlættingarheimið**

*Lágargarður*

## Lágargarður søkir eftir húsavørði

Hálvtíðarstarv sum húsavørður er leyst at søkja til setan skjótast tilber ella eftir nærri avtalu.

Umsøkjarar skulu hava maskinmeistaraútbúgving og skulu kunna arbeiða aðru hvørja viku.

Starvið er lønt sambært sáttmála ímillum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við neyðugum prógvum møguligum viðmælum skulu sendast til

**Leiðaran á Lágargarði**
Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

Meira fæst at vita um starvið við at ringja 316788.

Umsóknarfreistin er til mikudagin 25. februar 2004.

---

## Kunngerð

### um innangarðsútskiftingarfund í Hesti

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund í Hesti mikudagin 12. mai 2004 kl. 10.00.

Til viðgerðar verður innangarðsútskifting av Hests bygd.

Nevndarlimirnir eru Jytta Juul, Funningur og Jákup Skoradal, Miðvágur.

Tórshavn, tann 4. februar 2004

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

---

## Felagið Agape

hevur skeið 20. - 21. februar
í Meinigheitshúsinum í Havn
**Evnið: Sorg og kreppa**

**Undirvísarar: Connie og Mads Noer,** psykoterapeutar og familjurráðgevarar við drúgvum royndum innan undirvísing, samtalu og ráðgeving.

**Undirvísingin** byrjar fríggjakv. kl. 19.30.

**Kostnaður** 450 kr.

Nærri fæst at vita og fráboðan um luttøku hjá Viggo Johannesen, tlf. 321175 ella Sólbjørg Símunarson, tlf. 310899

**Hjartaliga vælkomin.**

---



# Stuðulin bilaði ikki



*Sosialurin í Århus: Blaðfólkini Ingrid Bjarnastein ogHeri á Rógvi og fotografurin Nicolai Lorenzen*



*Ommurnar báðar ivaðust ongantíð í at fara til Danmarar at fylgja ommudótturini í Melodi Grand Prix. À myndina síggjast eisini lítlasysturin hjá Petsi, sum er uppkallað eftir Tvørfoss ommuni, og mamman, Heidi.*

*Mynd: Nicolai Lorenzen*



*Heidi Tvørfoss stóð á odda fyri at býta fløggini út millum føroysku áhoyrarnar.*

*Mynd: Nicolai Lorenzen*




*Bæði familja og kenningar gjørdu sítt fyri at stuðla Petsi - bæði á føroyskum og á donskum.*

*Mynd: Nicolai Lorenzen*

**Hóast tað kanska ikki gekk eins væl, sum tað varð spátt undan kappingini, so vóru stuðlarnir hjá Petsi væl nøgdir. Og teir vóru ikki so fáir**

GRAND PRIX
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

**Atletion, Århus:** Merkið veittraði dúgliga í Atletion leygarkvøldið. Bæði til aðalroyndina og til sjálva beinleiðis sendingina sóust fitt av føroyskum fløggum. Tað er ikki bara sum at siga tað at fáa sína familju við til eitt tílíkt tiltak. Tey fleiri enn fýratúsund atgongumerkini vórðu seld, áðrenn tey høvdu verið lýst til sølu í ein tíma. Sostatt var tað ringt hjá familjuni at sleppa sita saman til sjálvt Grand Prixið, men til aðalroyndina var ein stórur partur av einum blokki fullur av føroyingur. Og fløggini veitraðu óført. Aðalroyndin í sær sjálvum var eitt sindur langdrigin, men tað var tað vert fyri føroysku áskoðararnar - fyri teir fýra minutt-irnar, ið Petsi átti av aðalroyndini.

### Í fleiri bólkum

Hóast tað varð dúgliga býtt út við donskum fløggum, so sóust føroysku fløggini eisini rímiliga væl til sjálvt Grand Prixið leygarkvøldið. Fólk møttu í góðari tíð, og lagið var framúr gott longu væl áðrenn, at tann fyrsti sangurin varð sungin.

Kring um í Altetion vóru veitraði pappírsútgávur av Merkinum. Til endamálið vóru nøkur vinfólk hjá Tvørfoss familjuni umvend til føroyingar. Tey vóru væl útgjørd við føroyskum fløggum og skeltum. Skeltini vóru skrivaði við bæði føroyskum og donskum orðum.

Onkur føroyingur uttan fyri Tvørfoss bólkin var eisini í Atletion leygarkvøldið. Tey gjørdu øll sítt fyri at stuðla Petsi.

Danskir fjølmiðlar løgdu eisini til merkis, at onnur fløgg enn tey donsku vóru í Atletion. Og Petsi sjálv legði so avgjørt eisini til merkis, at fólk vóru komin at stuðla henni.



*Merkið var sjónligt í Atletion leygarkvøldið.*

*Mynd: Nicolai Lorenzen*